Mentanarhúsfelagið:

# Eitt virkið felag í Runavíkar kommunu

**Á aðalfundi í Mentanarhúsfelagnum í Runavíkar kommunu seinasta sunnudag, legði formaður felagsins, Kári Thorsteinsson, fram fyrstu ársfrágreiðingina síðan endurstovnanina, 25. apríl 2002. Aðalmálið hjá felagnum er at byggja eitt mentanarhús í Runavík, men felagið hevur eisini síðan endurstovnanina skipað fyri og verið við til at skipað fyri eini røð av ymiskum tiltøkum – ikki minst í samband við Eystanstevnu**

MENTAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í blaðnum týsdagin høvdu vit samrøðu við Kenneth Rasmussen, sum er nevndarlimur í Mentanarhúsfelagnum. Hann greiddi frá, hvussu langt ætlanir felagsins um eitt mentanarhús eru komnar.

Mentanarhúsfelagið, sum hevur stívliga hálvt annað ár á baki, kallaðist í sínari tíð Bygdarhúsfelagið og varð stovnað longu í 1975. Fyrst í áttatiárunum datt felagið niðurfyri, og síðan lá virksemið stilt í fleiri ár. Við endurstovnanini broytti felagið navn.

### Kabarett og konsert

- Síðan nýggj nevnd varð vald at taka sær av málsetninginum, hevur verið arbeitt við fleiri ætlanum um eitt mentanarhús í Runavíkar kommunu. Eisini hevur felagið verið sera virkið at skipað fyri tiltøkum, sum mugu metast at hoyra undir eitt slíkt felag – nú og helst eisini í framtíðini.

Kári Thorsteinsson, formaður, segði í ársfrágreiðing síni, at eitt tað fyrsta tiltakið av sínum slag, var Eystanstevnan 2002, har felagið fór undir at skipa fyri Eystanstevnukabarett í Glyvra skúla og stórari uttandura Eystanstevnukonsert á økinum omanfyri Brotið í Saltangará.

- Sjálvt um fyrireikingartíðin var rættiliga avmarkað, eydnaðust tiltøkini sera væl, og avgjørt varð at royna tiltøkini aftur á Eystanstevnu í ár.

Formaðurin vísir á, at felagið eisini var við til at skipa fyri einum minni parti av kvøldsetuni, sum á hvørji Eystanstevnu verður hildin sunnukvøld – fyri líka sum at enda sjálva stevnuna við tónleiki, sangi, skemti og øðrum til gamans og álvara.

- Í ár stóð felagið sjálvt fyri fyrireikingini av kvøldsetuni, har Eyðun Gaardbo hevði átikið sær at samskipa tiltøkini. Somuleiðis var Eystanstevnukabarettin aftur í ár í Glyvra skúla, og her varð tað Kenneth Rasmussen, ið samskipaði. Nógv fólk vitjaðu kabarettina, og serliga nógv sóu seinastu sýningina. Báðir hava teir víst stórt hegni at taka sær av slíkum tiltøkum.

Kári segði, at tey væntaðu nógv fólk til uttanduramkonsertina, men aftur í ár noyddist felagið at ásanna, at tað er sera trupult at "fanga" fólk og fáa tey at koma til tiltøkini.

- Tey ungu koma ikki í býin fyrr enn væl eftir midnátt, og tá eru slík tiltøk vanliga liðug.

Hann vísir á, at Eystanstevnukonsertin í ár varð skipað soleiðis, at ein barnakonsert var frammanundan.

- Hetta eydnaðist stak væl, hóast ynskiligt er, at fleiri koma til konsertirnar. Tað hevur týdning bæði fyri tey, sum eru á palli, áhoyrarar og fyrireikarar.



*Kári Thorsteinsson er formaður í Mentanarhúsfelagnum í Runavíkar kommunu*

*Mynd: Jens Kr. Vang.*

### Savnandi tiltøk

Kári Thorsteinsson segði, at Mentanarhúsfelagið hevur verið partur av Eystanstevnunevndini, sum annars er samansett av feløgum í kommununi.

- Hendan umboðan er sera týdningarmikil fyri felagið, sum soleiðis hevur ein avgjørdan og virknan leiklut í tí, sum skal fara fram av tiltøkum í samband við stevuna. Tað er í hesi nevnd, at skráin fyri Eystanstevnuna verður snikkað til og endaliga løgd.

Hann segði, at Mentanarhúsfelagið er ógvuliga fegið um tað samstarv, sum verið hevur í nevndini – og somuleiðis fegnast felagið um samstarvið við Runavíkar kommunu.

- Kunningarstovan eigur eisini stóra tøkk fyri tað ómetaliga stóra arbeiði, tey leggja í alt virksemi her á okkara leiðum og ikki minst í Eystanstevnunevndini, segði Kári.

Saman við ársfrágreiðingini hjá Mentanarhúsfelagnum, fylgir eisini ein langur listi yvir tiltøk, sum felagið hevur skipað fyri síðan endurstovnanina. Sjálvt um tiltøkini vórðu væl og virðiliga lýst, noyddist felagið kortini at ásanna, at áhugin fyri fleiri av hesum tiltøkum var ógvuliga lítil. Tó vóru undantøk.

- Tað vísir seg, at hevur tú rætta tiltakið til røttu tíðina – so koma fólk. Hetta mugu vit leggja okkum í geyma. Men sum mentanarfelag, mugu vit eisini leggja okkum eftir teimum tiltøkum sum bjóða seg fram og sum ikki altíð venda sær til tann breiða skaran av fólkinum.

Kári vísir á, at eitt tað seinasta tiltakið, sum felagið skipaði fyri við 17 sangarum, kvinnukórinum Suð og tónleikarunum, Monicu Strauss Joensen og Helgu H. Gerðalíð, vísti, hvussu umráðandi tað er hjá felagnum at fáa egin hølir til konsertir og onnur tiltøk.

- Konsertin, sum var í Runavíkar skúla, var á høgum stigi. Skulu tey, sum framføra og vit onnur, sum lurta, fáa tað burtur úr, sum eitt slíkt tiltak krevur, sigur tað seg sjálvt, at vit eiga at stremba eftir at fáa so góð hølisviðurskifti, sum yvirhøvur gjørligt.

### Miðvíst arbeiði

Formaðurin í Mentanarhúsfelagnum segði, at felagið miðvíst hevur arbeitt við ætlanini at byggja eitt mentanarhús í kommununi – og nógvir møguleikar hava verið troyttir.

- Eitt skifti varð eisini tosað um at byggja saman við felagnum Høganesi, men hesin møguleikin tykist vera farin aftur við borðinum, tá ið økið, talan kann vera um, neyvan verður tøkt til felagsendamál. Harnæst er enn óvist, hvussu ætlanin við Høganesi verður skipað.

Kári sigur, at felagið seinastu tíðina hevur bíðað eftir eini avgerð hjá Runavíkar kommunu um, hvørji økir kundu hugsast at verið egnaði at byggja á.

- Kommunan hevur havt serkøna arkitektahjálp innan býarplanlegging úr Danmark á vitjan og hava hesi gjørt ymisk tilmæli ella uppskot til kommununa. Seinasta ætlanin, sum felagið hevur havt serstakan áhuga í, er ein komandi skúlabygging í kommununi.

Formaðurin sigur, at Mentanarhúsfelagið við eini nýggjari skúlabygging sær møguleikan at verða ein partur av hesi heild.

- Eg trúgvi, at kommunalu ætlaninar við skúlabygging og ætlaninar hjá okkum við einum mentanarhúsi, koma at skapa stórar og týðandi møguleikar fyri komandi mentanarlívinum í kommununi.

### Ikki felagsbygging

Kári sigur, at felagið sendi kommununi skriv, har tey reistu ynski um at byggja eitt mentanarhús saman við komandi skúlanum. Felagið legði kortini dent á at gerast skuldi eitt greitt ábyrgdarbýti millum Mentanarhúsfelagið og kommununa um felags bygging.

- Fyrimunirnir høvdu verið, at byggingin og raksturin høvdu verið bíligari, og møguleikarnir fyri felags nýtslu av hølunum høvdu verið sera góðir.

Hann sigur, at mentanarnevndin í kommununi seinni hevur svarað felagnum og hevur víst á, at kommunan ikki er áhugað fyri eini felags bygging.

- Kortini vísir mentanarnevndin á, at eitt mentanarhús kundi verið bygt á sama staði, sum skúlin verður bygdur, og soleiðis kundu møguleikar verið fyri felags nýtslu av hølum og øðrum.

Kári Thorsteinsson sigur at enda, at út frá hesi sannføring hevur Mentanarhúsfelagið arbeitt víðari við málinum um eitt mentanarhús í Runavík.

Á aðalfundi felagsins seinasta sunnudag varð uppskotið, sum Eyðun Petersen, verkfrøðingur, hevur gjørt, víst fram. Hann hevur eisini gjørt eitt modell av ætlaða mentanarhúsinum, sum byggjast skal í Runavík – á leiðini millum verandi skúla og húsini hjá Meinhardi.



# Oljumálaráðið hartar Tórshavnar býráð

**Søgan um umbyggingina av fyrrverandi dansistaðnum, Kvøldlot, heldur fram aftur. Í nýggjasta partinum av søguni hevur Høgni Danielsen fingið viðhald í einu kæru ímóti Tórshavnar býráð. Oljumálaráðið hartar Tórshavnar býráð fyri at hava gjørt eina ólógliga avtalu við grannarnar um byggingina av nýggja dansi– og matstaðnum**

BYGGIMÁL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Høgni Danielsen vil ikki útihýsa møguleikanum fyri, at hann fer at krevja endurgjald av Tórshavnar kommunu fyri mistar inntøkur. Fleiri orsøkir eru til, at byggingin er nógv seinkað, men Høgni Danielsen vónar, at Tórshavnar býráð tekur niðurstøðuna hjá Oljumálaráðnum til sín, so hann kann fara undir byggingina aftur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað eru eftirhondini nógv ár liðin, síðan tíðindi vóru um, at Høgni Danielsen skjótt skuldi vera klárur við einum nýggi dansi- og matstaði, har Kvøldlot helt til. Fleiri orsøkir eru til, at bygningurin framvegis ikki er liðugur.

Í summar skrivaðu vit um, at Høgni Danielsen hevði kært Tórshavnar kommunu fyri Oljumálaráðið. Kæran var í tveimum. Umframt at sýta Høgna fyri at byggja eitt hóskandi ventilatiónshús á tekjuni, hevur kommunan eisini latið part av byggivaldinum til grannarnar.

Høgni Danielsen metti ikki, at málið varð rættvíst viðgjørt. Hann kærdi tí Tórshavnar kommunu fyri Oljumálaráðið, og úrskurður er nú komin í málinum. Oljumálaráðið kemur til ta niðurstøðu, at Tórshavnar kommunu hevur ikki borið seg rætt at.

Í samband við byggingina hevur Tórshavnar Kommuna latið byggivaldið yvir skeytinum hjá Høgna Danielsen til grannarnar, og tað hevur kommunan sambært Oljumálaráðnum ikki loyvi til.

Víst verður til lógina um býarskipaninr og byggisamtyktir, ið ikki heimilar eini kommunu at lata byggivaldið frá sær. Hetta er júst tað, ið Tórshavnar Kommuna hevur gjørt.

Kommunan hevur havt eina avtalu við grannarnar um, at ongar broytingar kunnu fremjast í byggingini uttan teirra samtykki. Høgni Danielsen segði í samrøðu við Sosialin fyrr í ár: - Hetta er ein óhoyrd mannagongd, at Tórshavnar kommuna bindir seg til grannarnar, um hvussu eg skal fyrihalda meg til mína bygging.

Tórshavnar kommuna hevur eftir øllum at døma borið seg skeivt at í málinum, og advokaturin hjá Høgna Danielsen krevur, at kommunan viðger málið av nýggjum skjótast gjørligt. Naggatódnin millum Tórshavnar býráð og Høgna Danielsen hevur havt við sær, at Høgni hevur ikki kunnað hildið fram við byggingini.

Advokaturin hjá honum krevur nú eina skjóta viðgerð í Tórshavnar býráð, so sleppast kann undan fleiri seinkingum, og uppaftur størri peningaligum tapi, sum hann málber seg.

### Nýggj viðgerð

Høgni Danielsen sigur, at hann vónar, at málið nú verður viðgjørt av nýggjum í Tórshavnar býráð, so hann kann fáa byggiloyvið og harvið fara undir aftur byggingina av dansi- og matstaðnum.

Sambært Høgna Danielsen hevur stóra stríðsmálið verið, at hann hevur verið noyddur til at halda seg til tvær ymiskar avtalur, sum ikki samsvara. Tórshavnar kommuna hevur havt eina avtalu við Høgna sjálvan, og eina við grannarnar. Hava grannarnir ikki vilja gingið ynskjunum hjá Høgna á møti, hevur Tórshavnar býráð vanliga tikið síðu við grannunum, hóast Høgni Danielsen aldin hevur skrivað undir nakað, ið heimilar grannunum at hava slíkt vald yvir hansara bygging.

Oljumálaráðið er nú komið til ta niðurstøðu, at Tórshavnar Kommuna hevur ikki loyvi at geva grannunum so stórt vald í málinum, og tískil metir Høgni Danielsen, at málið sjálvsagt eigur viðgerast av nýggjum í býráðnum.

### Møguligt endurgjald

Í skrivinum frá advokatinum hjá Høgna Danielsen til Tórshavnar kommunu verður fráboðað, at fyrivarni skal takast fyri einum endurgjaldi móti Tórshavnar Kommunu í málinum. Høgni Danielsen sigur, at eitt endurgjald kann væl koma upp á tal, tí hann hevur mist nógvan pening orsaka av seinkingini.

Hann leggur afturat, at fyrst og fremst má Tórshavnar Kommunu viðgera byggimálið av nýggjum, og tá kommunan er komin til eina niðurstøðu, fer hann endaliga at taka støðu til eitt møguligt endurgjald fyri mistar inntøkur.

## Má halda byggisamtyktina

**Tórshavnar býráð hevur tikið niðurstøðuna hja Oljumáláraðnum til eftirtektar. Tekniski stjórin á Tórshavnar býráð, Marius Müller, vísir kortini á, at kjarnin í málinum er um hvørt Høgni Danielsen hevur hildið seg til byggisamtyktina ella ikki. Okkara semja við grannarnar kemur bert afturat, sigur hann**

BYGGIMÁL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tekniski stjórin á Tórshavnar býráð, Marius Müller, sigur, at niðurstøðan hjá Oljumálaráðnum er tikin eftirtektar. Marius Müller greiðir frá, at Tórshavnar kommuna boyggir seg fyri, at kommunan ikki hevur borið seg rætt at viðvíkjandi avtaluni við grannarnar.

Hann leggur kortini afturat, at Høgni Danielsen heldur seg framvegis ikki til byggisamtyktina, og um hann gjørdi tað, so hevði eingin trupulleiki verið

Høgni Danielsen bygdi upprunaliga eitt ov stórt ventilatiónshús, og tað varð kravt av honum at umbyggja tað, so hann helt seg til galdandi byggisamtykt. Høgni Danielsen hevur síðan, í samráð við fleiri verkfrøðingar, sent Tórshavnar Kommunu nýggj uppskot, men øll uppskotini eru víst aftur.

Marius Müller vísir á, at Høgni Danielsen er vælkomin at gera húsini liðug, men støddin á ventilatiónsshúsinum má vera í samsvar við galdandi byggisamtykt.

– Kjarnin í málinum er framvegis, hvørt Høgni Danielsen hevur hildið byggisamtyktina ella ikki, og semjan millum okkum grannarnar kemur bert afturat, sigur tekniski stjórin á Tórshavnar býráð.

